# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fjølmiðlar og framtíð

Í morgun setti Rás 2 fokus á føroysku loftmiðlarnar og tess framtíð. Í rásarúminum vórðu stjórarnir fyri Kringvarpið og Rás2 og landsstýriskvinnan í fjølmiðlamálum.

Í sendingini kom fram, at vansin ella forðingin fyri loftmiðlarnar og fyri so vítt allar miðlar í einum so lítlum samfelag sum tí føroyska er, at brúkaratalið er so avmarkað. Tvs. at tey, sum skulu gjalda og tryggja, at vit hava góðar og fjøltáttaðar miðlar, eru so fá í tali.

Neyvan eru føroyingar ójavnir á máli um, at eisini Føroyar hava brúk fyri fjølmiðlum og eisini einum fjølbroytni á miðlaøkinum. Fjølmiðlarnir hava alstóran týdning fyri okkara samleika, fyri okkara mál og mentan og fyri demokratiið.

Stjórin í Kringvarpinum legði upp til samstarv á miðlaøkinum og helt, at miðlarnir eiga at standa saman og verja um føroyska málið. Hon helt fyri, at sjálvandi skal Rás2 eisini yvirliva. Hon metti tó ikki, at tað fór at gagna nøkrum, um man fór at nokta lýsingum í tí almenna kringvarpinum.

Stjórin í Rás2 vísti á samtyktina í løgtinginum um, at lýsingarnar í Kringvarpinum skuldu niðurlagast, soleiðis, at privatir miðlar fáa betri møguleikar at fáa lýsingar. Hann helt fyri, at um bara Rásin fekk ein lítlan part av lýsingarkøkuni hjá Kringvarpinum, so var framtíðin hjá rásini betri tryggjað.

Landsstýriskvinnan tók væl ímóti ynskinum hjá kringvarpsstjóranum um størri samstarv og nevndi møguleikan, at allar lýsingar í loftmiðlunum fóru í eina felags pulju og vórðu so býttir út aftur eftir einum ávísum lykli.

Sosialurin og Rás2, sum hava hildið til í stásiliga bygninginum hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni nú í fleiri ár, vilja framhaldandi vera veitarar av tíðindum, upplýsing og undirhaldi og íbirtarar til kjak í samfelagnum. Vit ynskja ikki monopol á føroyska fjølmiðlamarknaðinum. Kapping er sunn og góð og harvið verður dygdin eisini betri segði landsstýriskvinnan í Rás2 sendingini. Hon vísti tó á, at forðingin fyri hesum er avmarkandi fíggjarorkan og helt, at man eisini átti at samstarva um innihald.

Samstarv var lyklaorðið í sendingini. Spurningurin er so, hvussu man kann skapa fíggjarligt grundarlag undir, at allir hesir fyri føroyska samfelagið so týðandi aktørar yvirliva. Latið okkum royna at kjakast um hetta uttan at kenslurnar skulu taka yvir segði landsstýriskvinnan samtíðis sum hon staðfesti, hvussu stóran týdning ein public service stovnur hevur fyri Føroyar.

Alt gott um loftmiðlar, men vit mugu ikki gloyma týdningin bløðini hava. Og her hava føroyskir politikarar fullkomiliga svikið. Meðan onnur lond lata stuðul til bløðini, so eru bløðini í Føroyum fullkomiliga slept uppá fjall. Takið bara kjakið í bløðunum. Her hava politikararnir fullkomiliga frítt spæl og fáa allar sínar meiningar óskerdar í bløðini. Um somu tíð leggja teir sektina á, um hesi somu bløð hava nóg góðar fíggjarligar umstøður at virka undir. Blaðútberingarstuðul hevði bøtt um hetta og skal tað vera ynski okkara fyri 2010, at løgtingið setir pengar av til blaðútberingarstuðul umframt at liva upp til semjuna um loftmiðlarnar.

**Sosialurin**

## »Í líka máta« er »óføroyskt« - eisini »spísiskeið« og »rísingrýn«!

EYÐUN Á BORG



Helt, at »tey« vóru í dvala hesa ársins tíð, men skjótt beit á.

**Í LÍKA MÁTA:** »Í« er føroyskt, »líka« er føroyskt og »máta« er føroyskt. Hasi trý orðini saman eru óføroysk. Tey geva heldur onga meining. Skuldu vit kanska bent »líka« og sagt »í líkan máta«? ella kanska »(upp) á sama máta«?

Færri og færri føroyingar siga »í líka máta«. Fleiri og fleiri siga m.a. »somuleiðis«, sum bæði er føroyskt og íslendskt.

Ja, helst er tað í lagi, um orðið er komið úr íslendskum, tí føroyskt og íslendskt líkjast jú so nógv. Føroyskt er annars eitt lítið sindur eldri enn íslendskt, so kanska er orðið farið úr føroyskum til íslendskt!?

**MANN MÁ AKSEPTERA DANISMUR:** Soleiðis skrivar danismufjeppari. Nóg ringt er í dag, men málsligi vavgreyturin hevði verið nógv, nógv verri, um øll høvdu góðtikið danismurnar hesi seinastu stórthundrað árini!

**TOSA FØROYINGAR FØROYSKT?:** Brævskrivarin spyr, um tað, sum føroyingar siga, ikki er føroyskt. SVAR: Nógv, sum føroyingar siga, er avgjørt ikki føroyskt, men danskt!

**SPÍSISKEIÐ:** Spísiskeið er danskt. Tað eitur súpiskeið á føroyskum (stytt súsk., ikki spsk.). Vit súpa á føroyskum, vit eta ikki suppu, sum fleiri nú eru farin at siga.

**RÍSINGRÝN:** Hatta er eisini danskt. Tað eitur stutt og greitt rísgrýn á føroyskum (rís er hvørkikynsorð, sum ikki kann hava –in skoytt uppí).

**RÍSIN:** Rísin merkir m.a. illur og óslættur.

E.S.: Ein kvøða til Páll og Tobba í Tjóðveldi. Takk fyri, at tit verja borg í málstríðnum!

***Á Borg á Argjum gamla trettanda 2010***

***Við reinførismálkvøðu***

## KT og náttúruvísindi á Fróðskaparsetrinum

**Tíðindaskriv**

Í summar verður tikið upp til tríggjar bachelor útbúgvingar á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum: Jarð- og havfrøði, KT-verkfrøði og lívfrøði.

**Jarð- og havfrøði**

Tríggir høvuðsprofilar eru av útbúgvingini. Tú kanst vekta jarð- og havpartin javnt, ella leggja dent á annan av hesum og taka veðurlag ella umhvørvi aftrat sum ein part.

Í jarðvísindaliga partinum verður m.a. lært um, hvussu jørðin er vorðin til og hvussu hon á ymiskan hátt er broytt ígjøgnum milliardir av árum. Lært verður eisini um, hvussu ráevni verða til í undirgrundini, hvussu leitað verður eftir teimum og hvussu tey verða útvunnin.

Í havvísindaliga partinum verður m.a. lært um eginleikar og tilgongdir, sum stýra streymi, sjóvarfalli og aldu. Lært verður um m.a. týdningin, sum havið hevur fyri veðurlag og veðurlagsbroytingar, og um hvussu grøn orka kann vinnast úr streymi og aldu. Komið verður eisini inn á avbjóðingarnar, sum alda og streymur hava fyri ymiska vinnu á sjónum.

**KT-verkfrøði**

Hevur tú áhuga fyri at arbeiða við KT-loysnum og nýggjum vinnumøguleikum, so er bachelor í KT-verkfrøði (software engineering) rætta útbúgvingin fyri teg.

Útbúgvingin verður bjóðað í heilt nýggjum sniði í 2010. Nú kunnu øll, sum hava miðnámsprógv við B-stigi í støddfrøði sleppa inn at lesa KT-verkfrøði. Ongi krøv eru um alis- og evnafrøði. Útbúgvingin er skipað við m.a. støði í altjóða tilmæli um innihald í slíkari útbúgving (Software Engineering 2004, ACM/IEEE Computer Society).

Í útbúgvingini verður dentur lagdur á software menning innan tekniskar, fyrisitingarligar og handilsligar telduskipanir. Um áhugi er fyri tí ber eisini til í ávísan mun at skipa ein part av útbúgvingini við skeiðum frá øðrum universitetum. T.d. ber til at velja sær skeið frá Mittuniversitetet í Svøríki, sum hevur hollar royndir við fjarlestri.

Stórur tørvur er á KT-verkfrøðingum. Vinnan og almennir stovnar mangla KT-verkfrøðingar til verkætlanarleiðslu og menningarætlanir, forritan, granskning og dataviðgerð. KT-verkfrøðingar hava týðandi vitan innan kjarnuvirksemið hjá KT-, fjarskiftis- og orkuveitarum.

**Lívfrøði**

Hevur tú áhuga fyri spurningum um t.d. hvussu lívið varð til, hvussu tað broytist, hvussu arvurin stýrir útsjónd og evnum hjá livandi verum, og hvussu tær laga seg til umhvørvið, so er bachelor í lívfrøði ein áhugaverd útbúgving fyri teg.

Útbúgvingin gevur eina breiða vitan um lívfrøði. Lært verur um, hvussu livandi verur eru uppbygdar og hvussu tær fungera. Tú lærir um tilgongdir og menning á øllum lívsstigum, heilt frá DNA til ta fullskaptu veruna. Lært verður um djóra- og plantuheimin bæði í sjógvi og á landi.

Føroyar liggja fjarskotnar, og tað hevur á ymiskan hátt sett sín sermerkta dám á djóralív og plantulív okkara. Av somu orsøkum er altjóða áhugi fyri at gera genetiskar kanningar av føroyska fólkinum, tá ræður um at finna orsøkir til ávísar sjúkutilburðir.

***Náttúrvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum***


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.